

# Mesterlære – skriv med Bjarne Reuter

Her kunnu næmingarnir sleppa í meistaralæru hjá Bjarne Reuter – einum av mætastu rithøvundunum í Danmark, sum skrivar barna- og ungdómsbøkur. Í hesari sendingini hitta tey Bjarne Reuter, sum gevur hugskot og prei til skrivingina. Vísið næmingunum filmin Zappa og loyvið teimum at hyggja at hansara skrivistíli í einum broti í einari av hansara skaldsøgum. Næmingarnir skulu síðani umskriva brotið, har Mulle etur ein snigil soleiðis, at brotið kemur at snúgva seg um teirra royndir við happing.

/ Málbólkur: 5. 8. flokkur
/ Lærugrein: danskt
/ Sjónvarpssending: Mesterlære – skriv med Bjarne Reuter, DR1, 2020, 29 min.
/ Evnað til: Trine Ferdinand, lærugreinaráðgevi í donskum CFU KP

→ mitcfu.dk/TV0000120998

Copydan/
AVU-medier

cfu centre for undervisningsmidler

NÁM

# Námsfrøðilig viðmerking

**Næmingarnir fáa innlit í**

/ Hvør ein av Danmarkar mætastu rithøvundum, sum skrivar barna- og ungdómsskaldssøgur, er

/ At kanna, hvat filmurin Zappa og skaldsøgan hava í felag, og hvar filmurin brýtur frá skaldsøguni.

/ At fáa íblástur frá skriviháttinum, sum Bjarne Reuter nýtir, tá tey sjálv skulu umskriva brotið, tá Mulle etur ein snigil.

# Hugskot til undirvísingina

**Áðrenn**

Best er, um næmingarnir kenna til onkrar av tekstunum hjá Bjarne Reuter, áðrenn teir fara at hyggja eftir sendingini. Í sendingini greiðir Bjarne Reuter frá arbeiðinum við skaldsøguni og filminum Zappa, so tað er upplagt, at næmingarnir hyggja eftir filminum Zappa umframt lurta eftir einum broti úr skaldsøguni, áðrenn teir fara at arbeiða við sendingini.

Meðan næmingarnir hyggja eftir filminum Zappa, t.d. heima, kunnu teir skriva notur til eina av uppgávunum, sum eru síðst í hesari vegleiðingini. Být næmingarnar í smáar bólkar, sum hvør fær eina uppgávu, sum bólkurin síðani skal leggja fram fyri restini av flokkinum. Leinkið til filmin

→ mitcfu.dk/CFUFILM1070736

Í sendingini greiðir Bjarne Reuter frá, hvussu hann hevur broytt søguna, tá hann skuldi umskriva skaldsøguna Zappa til eitt filmshandrit, og um samstarv hansara við filmsstjóran, Bille August. Tí er tað viðkomandi at arbeiða við einari samanbering av filminum og skaldsøguni. Hetta kann gerast við niðanfyristandandi uppgávu.

Næmingarnir hyggja aftur eftir serliga brotinum frá Zappa, har Mulle etur ein snigil

→ youtu.be/2za5UI4CRko

umframt at teir lurta eftir ella lesa hetta sama brotið í skaldsøguni, sum er í byrjanini av kapitlinum, sum eitur Den 20. juni 1961. Hvat líkist og hvat brýtur frá í skaldsøguni og filminum? Hví er senan broytt í filminum? Lýs skrivistílin hjá Bjarne Reuter í hesum brotinum í skaldsøguni (humor, beinleiðis tala, lýsingar av umhvørvinum og av sansum). Lýs eisini, hvussu teksturin er settur upp.

Skaldsøgan kann lesast sum e-bók á mitcfu.dk

→ mitcfu.dk/CFUEBOG1074834

og sum ljóðbók á E-bókahillini

→ ereolen.dk/ting/object/870970-basis%3A27463576

**Meðan**

Nú skulu næmingarnir hyggja eftir sendingini við kapitlasetti. Í kapitlasettinum eru spurningar til næmingarnar, sum teir skulu svara, meðan teir hyggja eftir sendingini. Hetta kunnu næmingarnir gera hvør sær ella í smærri bólkum. Aftaná verður tosað saman um svarini hjá næmingunum.

**Aftaná**

Tá mann er í meistaralæru sum rithøvundur, sigur tað seg sjálvt, at mann eigur at royna at skriva sjálvur. Næmingarnir skulu umskriva brotið í skaldsøguni, har Sten trýstur Mulle at eta ein snigil. Brotið er í byrjanini av kapitlinum, sum eitur Den 20. juni 1961.

Skaldsøgan kann lesast sum e-bók á mitcfu.dk

→ mitcfu.dk/CFUEBOG1074834

og sum ljóðbók á E-bókahillini

→ ereolen.dk/ting/object/870970-basis%3A27463576

**Meistaralæruuppgáva – at umskriva eitt brot**
Tit skulu umskriva brotið, har Mulle etur ein snigl. Umskrivingin skal taka støði í tykkara egnu royndum og upplivingum – eins og Bjarne Reuter ger.

/ Tit skulu umskriva brotið, so at tað kemur at snúgva seg um okkurt órættvíst, sum tit sjálv hava upplivað, hava verið við til, ella hava hoyrt um.

/ Tit skulu nýta eitt umhvørvi, tit sjálv kenna.

/ Persónarnir skulu hava somu leiklutir, sum teir í Zappa: ein eygleiðari, eitt offur og ein happari. Tit velja sjálv, um persónarnir skulu vera tríggjar gentur ella tríggir dreingir, av tí at happingin millum gentur og dreingir kanska er ymisk. Um tit velja, at søgan snýr seg um tríggjar dreingir, skulu teir hava somu nøvn, sum teir í Zappa: Mulle, Steen og Bjørn. Um tit hinvegin velja, at søgan skal snúgva seg um tríggjar gentur, skulu tær eita: Mille, Stine og Bjørg.

/ Tá tit eru liðug at umskriva brotið, skulu tit framføra tað sum ein lesisjónleik fyri restini av flokkinum. Být leiklutirnar millum tykkum, og minst til, at ein skal vera frásagnarpersónur. Brotið skal framførast við innliving og kenslum, so tað verður áhugavert og spennandi at lurta eftir.

/ Avrita fyrsta brotið úr kapitlinum til og við setningin "Husk at være oppe klokken fem, mormor og morfar kommer!" Síðani kemur brotið, sum tit skulu umskriva.

Áðrenn næmingarnir byrja at skriva, eiga teir at gera eitt felags hugarok um ymiskar órættvísar hendingar, so teir kunnu fáa nøkur góð hugskot til søguna.

Tú kanst nýta hetta amboðið, 'Padlet', sum er ein talgild talva, til at geva næmingunum uppgávuna og samla svarini frá næmingunum: https://padlet.com/trine2/zappakopi Her sært tú eisini eitt næmingadømi um umskriving av hesum sama broti. Avrita 'Padlettin' og tillaga hann til tínar næmingar.

**Áðrenn næmingarnir fara í gongd at skriva, skulu teir hugsa um hesar spurningarnar í bólkum:**

/ Hvørja órættvísa hending skal tykkara brot snúgva seg um? Hugsa um eina órættvísa støðu, tit sjálv hava verið úti fyri. Tað kann vera, at tað gekk út yvir tykkum, ella at tit sóu onkran annan uppliva hetta. T.d. kann tað snúgva seg um onkran, sum verður happaður.

/ Skal tað snúgva seg um tríggjar gentur ella um tríggjar dreingir?

/ Hvar skulu hendingarnar fara fram? Veljið eitt umhvørvi, tit kenna væl, júst sum Bjarne Reuter ger í Zappa. Her ímyndaði hann sær, at holan var í skóginum yvirav, har Bjarne búði í Brønshøj.

/ Tit skulu nýta sama frásagnarhátt, sum Zappa hevur: eina 3. Persóns frásøgn við sjónarhorninum hjá Bjørn.

/ Tit skulu royna at nýta sama skrivingarlag, sum Bjarne Reuter í Zappa. Kanna notur tykkara um hansara skrivingarlag og uppsetingina av tekstinum.

Næmingarnir skulu framføra teirra brot fyri restina af flokkinum sum ein lesisjónleik. Síðani skulu næmingarnir eftirmeta hvønnannan sambært niðanfyri standandi viðurskiftum. Allir næmingarnir eiga at lesa tekstin, meðan hann verður framførdur.

/ Er órættvísa støðan viðkomandi og áhugaverd at lurta eftir?

/ Er nakað, tit kenna aftur frá tykkara egna lívi?

/ Verður brotið framført við innliving og kenslum?

/ Á hvønn hátt minnir hetta um skrivingarlagið hjá Bjarne Reuter?

/ Er brotið sett upp eins og í skaldsøguni?



Fylgiskjal

# Uppgávur til filmin Zappa

Tit skulu svara eina av niðanfyri standandi uppgávum í smærri bólkum. Skrivið tykkara svar í ein "Padlet". Tað er av týdningi, at tit tosa um uppgávuna og spurningarnar saman, áðrenn tit skriva svarið niður. Aftaná skulu tit leggja svar tykkara fram munnliga fyri flokkinum. Minnist til at avtala, hvør sigur hvat.




1/ **Sten.** Lýs Sten og hansara leiklut í dreingjabólkinum. Hví er tað so umráðandi hjá Sten at stýra og hava eftirlit við sínum vinum? Broytist hann gjøgnum filmin, og um so er, hvussu?

2/ **Bjørn.** Lýs Bjørn og hansara leiklut í dreingjabólkinum. Hví er tað so trupult hjá Bjørn at gera nakað við, hvussu Sten stýrir bólkinum? Hvat er tað, sum ger at hann at enda kortini ger nakað við støðuna? Broytist hann gjøgnum filmin, og um so er, hvussu?

3/ **Mulle**. Lýs Mulle og hansara leiklut í dreingjabólkinum. Hví er hann niðast í stiganum í dreingjabólkinum, og hví letur hann Sten eyðmýkja seg? Broytist hann gjøgnum filmin, og um so er, hvussu?

4/ **Familjan og heimið hjá Sten.** Lýs heimið og familjuna hjá Sten. Hygg eftir myndini niðanfyri. Hvørja sosiala stætt í samfelagnum hoyrir familjan til? Hvørja ávirkan hava viðurskiftini í heiminum á atburðin hjá Sten?

5/ **Familjan og heimið hjá Bjørn.** Lýs heimið og familjuna hjá Bjørn. Hygg eftir myndini niðanfyri. Hvørja sosiala stætt í samfelagnum hoyrir familjan til? Hvørja ávirkan hava viðurskiftini í heiminum á atburðin hjá Bjørn?

6/ **Familjan og heimið hjá Mulle.** Lýs heimið og familjuna hjá Mulle. Hygg eftir myndini niðanfyri. Hvørja sosiala stætt í samfelagnum hoyrir familjan til? Hvørja ávirkan hava viðurskiftini í heiminum á atburðin hjá Mulle?




7/ **Heitið.** Heitið á filminum "Zappa" – Hví er heitið á filminum navnið á einum ránfiski? Hví er Sten hugtikin av Zappa? Ber saman Sten og Zappa.

*(Við íblástri úr undirvísingargongdini til filmin á Filmcentralen.dk)*